# Skopunar kommuna rend á húsagang

**Hóast Skopunar kommuna fyri nøkrum árum síðan breyt lániforboðið og ikki helt sínar skyldur, gjørdi kommunala eftirlitið einki, og ikki fyrr enn í november í fjør varð kommunan veruliga sett undir umsiting**

Randi Jacobsen

Skopunar kommuna var partur av samlaðu føroysku kommunuloysnini, sum gjørd var seinast í nítiárunum, tá ið fleiri kommunur vóru saneraðar. Allar tær saneraðu kommunurnar fingu treytir um afturgjald við tí endamáli at koma undir eina álíkning í kommunuskuld.

Tey fyrstu árini eftir aldarskiftið gekk væl hjá Skopunar kommunu at halda treytirnar, og skuldin nærkaðist eini álíkning, men nøkur ár seinni fór aftur at ganga skeiva vegin.

Hetta vísa skjøl, sum Sosialurin hevur fingið innlit í.

Fyrsta stóra fetið skeiva vegin var, tá ið kommunan, hóast lániforboð, gjørdi sáttmála við J& K Petersen um at gera nýggja útstykking. Kommunan átti ongan reiðan pening til ætlanina, men lænti pening frá fyritøkuni og skuldi so avdraga skuldina yvir eitt áramál.

## Eftirlitið segði einki

Hóast hesin óvanligi fíggingarmáti og óheimilaga lántøkan vórðu umrødd í miðlunum, læt kommunan eftirlitið ikki við seg koma.

Útstykkingin kostaði 5,4 mió. krónur umframt rentur, upplýsir kommunan seinni Fíggjarmálaráðnum.

Kommunan bant seg yvir fyri byggifyritøkuni J & K Petersen at gjalda 100.000 krónur um mánaðin. Rentan man ikki hava verið so galin, tí seinni segði kommunan Fíggjarmálaráðnum seg ikki fáa semju við J & K Petersen "sum ikki hevur hug at minka um renturnar".

## Umløgdu óheimilaðu skuldina

20. november í 2007 gav Jacob Vestergaard, táverandi landsstýrismaður í kommunumálum kommununi loyvi at umleggja lánið frá J & K Petersen fyri útstykkingina og at taka upp í tað lánið ógoldnar rokningar frá liðugtgjørda barnagarðinum. Upphæddin var samanlagt 6,03 mió. krónur. Við hesum átaki vórðu greiðar treytir settar Skopunar kommunu, sum bant seg til at rinda avdrátt uppá í minsta lagi tvær mió. krónur árliga fyri árini 2007-2012, og at skuldin hjá kommununi skuldi koma undir eina álíkning innan 2012. Íalt bant kommunan seg til at gjalda 12 mió. krónur í avdráttum hesi seks árini.

## Rindaði einki

Hóast hesa ásetingar virkaði Skopunar kommuna ikki eftir avtaluni. Eingin króna varð goldin í avdráttum í 2008 og 2009 við tí úrsliti, at skuldin tók dyk á seg. Við ársenda 2009 varð skuldin gjørd upp til at vera 19,4 mió. krónur, kassakredittirin var minus 1,3 mió. krónur, og haraftrat hevði kommunan 2,6 mió. krónur í leysaskuld. Sambært tøku upplýsingunum var skuldin hjá kommununi 23,3 mió. krónur samanlagt 31. desember 2009.

Skopunar kommuna gjørdi tó lítið og einki fyri at halda aftur í rakstrinum og helt fram at gera nýggjar íløgur. Í fíggjarætlanini fyri 2009 stendur, at avdráttir eru settir til 1,87 mió. kronur, men sambært roknskapinum er ikki ein króna goldin í avdrátti.

## Støðan álvarslig

Ikki fyrr enn á sumri 2010 vaknaði Fíggjarmálaráðið, sum tá hevði fingið fíggjarligu ábyrgdina av kommunala eftirlitinum, við kaldan dreym. Fíggjarmálaráðið metti, at støðan var so álvarslig, at eitthvørt mátti gerast. Kommunan fekk fleiri spurningar um fíggjarligu viðurskiftini, og serliga varð kommunan spurd, hví hon ikki helt seg til ásetingarnar um at skerja raksturin og gjalda avdráttir, soleiðis sum avtalan frá 2007 segði.

Tá ið Skopunar kommuna ikki rindaði J & K Petersen tær 3,3 mió. krónurin, sum hon skuldi gera við umfígginini, søkti kommunan Fíggjarmálaráðið um loyvi at brúka nevndu upphædd til "onnur viðurskifir, sum eru alneyðug fyri bygdina, tildømis vegir og kirkjugarð". Eisini sigur kommunan, at tað er alneyðugt at útbyggja kommununa: "Vit síggja grannabygdina vera útbygda fyri 10 tals mió. við gávum. Hetta gevur eisini ein mismun í hesi lítlu niðursetu bygdini".

28. juni 2010 váttar Gerhard Lognberg, borgarstjóri "at allar skyldur, sum hvíla á kommununi eru við og verða vístar á rættan hátt í roknskapinum 2009".

## Brutu avtaluna

12. august ásannaði Fíggjarmálaráðið, at framvegis var svar ikki komið upp á spurningin um, hví Skopunar kommuna ikki hevði hildið fíggjaræetlanina fyri 2009. Fíggjarmálaráðið boðaði frá, at "formlig stig verða tikin, um svar ikki verða givin".

Einki hendi, og Skopunar kommuna gavst ikki so.

15. novembr 2010 søkti kommunan Fíggjarmálaráðið um loyvi at taka upp enn eitt lán frá BankNordik, tí "vit hava eitt yvirtrekk í kassakredittinum uppá uml. 2,9 mió. kr." "Hetta hevði bankin vilja lagt í eitt lán, so var trupulleikin loystur, tí vit doyggja rentudeyðan", sum kommunan orðaði seg.

25. november í fjør hevði borgarstjórin í Skopunar kommunu fund við Fíggjarmálaráðið, sum var umboðað av Jóannesi Eidesgaard, Terja Petersen og Peturi Alberg Lamhauge. Á fundinum fekk borgarstjórin greið boð um at fremja broytingar í fíggjarligu viðurskiftunum. Tá ið tær eru framdar, verða avdráttirnir av lánum 1,5 mió. krónur um árið.

## Semja

Í skrivi frá Fíggjarmálaráðnum til Skopunar kommunu dagfest 26. november 2010 er semja gjørd millum Skopunar kommunu og Fíggjarmálaráðið um at fremja ávís tiltøk.

Frá 2011 skal skuldin avdragast við minst 1,5 mió. krónum um árið, til skuldin er komin undir eina álíkning.

Kommunan skuldi gera eina frágreiðing um, hvørji tiltøk verða sett í verk.

Lánveitarin fær transport í skattaavrokningini upp á 235.000 krónur um árið.

Tá ið Fíggjarmálaráðið hevur fingið vissu fyri, at tiltøkini eru sett í verk, fer Fíggjarmálaráðið at viðgera spurningin um umfígging á hesum grundarlagi:

Núverandi kassakredittur verður lagdur í eitt langfreistað lán. Væntað verður í hesum sambandi, at kommunan í hesum tíðarskeiðinum byggir sær upp neyðugt gjaldføri.

Eingin kassakredittur verður loyvdur frá 1. mai, og allar rokningar verða goldnar.

Niðurstøðan er undirskrivað av Joannesi Eidesgaard, landsstýrismanni og kommunustýrinum í Skopun.

## Hongur ikki saman

Í skrivi frá Fíggjarmálaráðnum, dagfest 29. november 2010, fekk Skopunar kommuna loyvi at taka upp lán men við hesum treytum:

Kassakredittурin skal vera 0 krónur 1. apríl í ár. Tá skulu 400.000 krónur altíð vera á kontuni seinast í mánaðinum tøkar til lønir, og gjaldføri skal eisini verða til at gjalda vanligu kreditorunum.

Kommunan fær eitt avdráttarfrítt lán á 11 mió. krónur í seks ár við fastari rentu.

Eitt seriulán av restini av lánsskuldini verður lagt inn, og avdráttirnir verða 125.000 krónur um mánaðin. Bankin fær transport í kommunuavrokningini, 235.000 krónur um mánaðin.

Flytast kann ikki av lánskontunum til rakstarkontur uttan loyvi frá landsstýrismanninum.

Hóast Skopunar kommuna er sett undir umsiting og er bundin til ikki at gera nýggjar íløgur enn á sinni, so byggja skopuningar framvegis skúla, gera kirkjugarð og annað.



*Gerhard Lognbrg hevur verið borgarstjóri í Skopun øll hesi árini*